# Fulltrúi hjá Løgtingsins umboðsmanni

Hjá Løgtingsins umboðsmanni er eitt starv sum fulltrúi leyst at søkja til setan frá 1. sept. 2004 ella eftir nærri avtalu.

**Embætið**
Umboðsmaðurin, ið virkar sambært løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000, fór undir virksemi sítt 1. mai 2001. Uppgávan hjá umboðsmanninum er at hava eftirlit almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, herundir at viðgera klagur frá borgarunum um avgerðir v.m. Á skrivstovuni starvast í løtuni umframt umboðsmannin, ein løgfrøðiligur ráðgevi og ein skrivstovufulltrúi.

**Uppgávurnar**
Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:
- fyrireiking og viðgerð av innkomnum klagum
- uppgávur í sambandi við eftirlitskanningar av málsviðgerðini á útvaldum økjum, og
- kunningarvirksemi um fyrisitingarlig evni og um virksemið hjá umboðsmanninum.

Talan er um eitt rættiliga sjálvstøðugt og avbjóðandi starv.

**Setanartreytir**
Tann, sum settur verður, skal hava prógv sum løgfrøðingur. Stórur dentur verður harumframt lagdur á royndir eftir lokna útbúgving, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur starvsroyndir innan almennu fyrisitingina.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya. Møguleiki er fyri setan sum ráðgevi, um førleikin og royndirnar eru til tess. Tann, sum settur verður, má tola møguligar broytingar í arbeiðsuppgávunum.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av prógvum v.m. skulu verða umboðsmanninum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 5. juli 2004, kl. 12.00.** Adressan er:

**Løgtingsins umboðsmaður**
Niels Finsensgøta 39 ·Postboks 1339
FO-110 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Joen H. Andreassen, umboðsmann ella Johnhard Klettheyggj, ráðgeva á tlf. 358500.


TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað, ið fæst í Snarskivuni og á heimasíðu kommununar.

www.torshavn.fo

## Ólavsøkan 2004

Viðvíkjandi sølu og tiltøkum

Freistin at flýggja inn umsóknarblaðið er sett til mánadagin 21. juni 2004 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 21. juni 2004 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.


# Jørð í Suðuroy til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður selt matr. nr. 6, Nes-Vágur, 31.439 $m^2$ innangarðs og 8 gyllin í Neshaga, Innaripartur.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen, adv.**
Bryggjubakki 22, boks 106
110 Tórshavn
tlf. 359595, telefax 359596

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3693, Sp/f 18. Desember 2003, 700 Klaksvík

Viðtøkur broyttar:
04.05.2004
Nýtt navn: Sp/f Mjóvin

Skráseting Føroya tann 15. juni 2004

Kristin Balle

# Bróðurringurin á Havinum

Ársfundirnir 2004 verða í ár hetta vikuskifti í Leguhúsinumí Nesvík.

**Fríggjadagin 18. juni kl. 20.00**
Møti v/ Sylverius Jacobsen, Skála og Gulak Hansen, Tjørnuvík, Jónhilda og Gulak Hansen syngja.

**Leygardagin 19. juni kl. 20.00**
Møti v/ Ole Nielsen, Danmark og Símin Joensen, Saltangará, Streingjakórið á Glyvrum syngur.

**Sunnudagin 20. juni kl. 11.00**
Gudstænasta og altargongd í Haldórsvíkar kirkju v/ Sverra Steinhólm, presti.
**kl. 18.00**
Møti v/ Niels Jacob Nielsen, trúboðara, Strendur og Regin Olsen, Tórshavn, sangbólkurin Gittit syngur.

Møtini eru almenn.

Limafundurin verður leygardagin 19. juni 2004 kl. 15.00 v/ Regin Olsen, Tórshavn.

**Stýrið fyri Bróðurringin á Havinum**

# Vágs skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2004/2005.

Eitt tíðaravmarkað starv við fullum tímatali vegna avlopstímar, serligan tørv og lækkað tímatal.

Eitt tíðararmarkað starv við 25 pultstímum um vikuna vegna avlopstímar, serligan tørv og lækkað tímatal.

Eitt tíðaravmarkað starv við 19 pultstímum um vikuna vegna avlopstímar og lækkað tímatal.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran á tlf. 373192 ella 374066.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinsta lagi leygardagin 19. juni 2004.

**Skúlastýrið fyri Vágs skúla**
v/ Eilen D. Simonsen
925 Nes, Vágur

**Søkt verður eftir**

## mekanikarum

til at arbeiða uttanlands.

Ring 332422 millum kl. 8.00 og 16.10, ella send ein teldupost til jakup@oilwind.fo fyri at frætta nærri.

OILWIND

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2964, P/F Føroya Lívstrygging, 100 Tórshavn

Nevnd:
Farin úr nevndini: Allan Terji Skaalum, Gundadalsvegur 37, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Kristian Reinert Davidsen, í Svanga 33, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 15. juni 2004

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3795, Sp/f 02.06.2004, 100 Tórshavn

**Viðtøkur broyttar:**
08.06.2004
**Nýtt navn:** Sp/f Timberline Helene

*Skráseting Føroya tann 14. juni 2004*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 641, Sp/f Star Line, 100 Tórshavn

Viðtøkur broyttar:
21.04.2004
Nýtt navn: Sp/f N-W
Nýggj hjánøvn: Sp/f North-West (Sp/f N-W) og Sp/f Seabroker (Sp/f N-W)
Nevnd:
Farin úr nevndini: Niclas Peter Daniel Niclasen, Grønalíð 16, 100 Tórshavn (formaður) og Páll Poulsen, 410 Kollafjørður.
Innkomin í nevndina: Høgni Løvendahl Rasmussen, á Frælsinum 8, 100 Tórshavn (formaður) og Beinta Løvendahl Rasmussen, á Frælsinum 8, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Páll Poulsen, 410 Kollafjørður.
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: Sp/f AB-grannskoðan v/ Símun Absalonsen, Sleipnisgøta 12, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 15. juni 2004

Kristin Balle




# Koyrikort?

Nýggj teoriskeið byrja mánadagin 21. juni kl. 17.30 til persónbil

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99 • 21 10 96

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn


# Hvalbiar skúli

Søkt verður eftir lærara til Hvalbiar skúla í tíðaravmarkað starv til skúlaárið 2004/2005 at lesa avlopstímar.

Starvið er umleið fult lærarastarv.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18-1 til 27-4.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 24. juni 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til fyrstalæraran, tlf. 375083 ella 215878.

**Hvalbiar skúlastýri**
v/ Róin Schrøter
850 Hvalba

# Tofta skúli

Hesi størv eru leys at søkja fyri skúlaárið 2004/2005.

- 1 fulltíðar lærarastarv fyri lærara í farloyvi
- 1 fulltíðar lærarastarv fyri lærara í farloyvi frá 1/8-2004 til 31/12-2004
- 2 fulltíðar lærarastørv vegna avlopstímar, harav annað er við 12 t/v til serligan tørv
- 1 lærarastarv til serligan tørv, 15 t/v

Øll størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2004/2005, uttan eitt, sum er fyri tíðarskeiðið frá 1/8-2004 til 31/12-2004. Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

- 1 starv sum stuðul, 16 t/v
- 1 starv sum stuðul, 9 t/v

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á telefon 447332.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 26. juni 2004, kl. 12.00.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
FO-650 Toftir


# Starvsfólk



Vit hava tørv á nøkrum barrfólkum, duravørum og avruddarum.

Mugu kunna arbeiða á ólavsøku

YERTSHÚSIÐ


# Lærari til Húsa/Syðradals skúla

Húsa/Syðradals skúli søkir eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2004/2005.

Starvið er avlopstímar uml. 25 t. um vikuna. Í skúlanum eru flokkar frá 1.–9. flokk. Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Freistin at søkja er 3. juli.

Skrivlig umsókn verður at senda til:
**Skúlastýrið**
v/ Elin Syderbø
796 (Húsar(1)
tlf. 456364

# Hósvíkar skúli

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2004/05 at undirvísa uml. 25 t/v.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsøknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 24 juni 2004 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 422259 ella 422526.

**Skúlastýrið fyri Hósvíkar skúla**
v/ Adolf Johanessen
FO-420 Hósvík


# Toyota - dele

brugte og nye

Vi sender hver dag til Færøerne

AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk


# 7 persóna bilur til sølu



Ein sera væl hildin og væl útgjørdur Honda Stream 1,7 til sølu. Bilurin er frá nov. 2002 og hevur koyrt 20.000 km. Kostnaður 190.000 kr.

**Tlf. 223438**

# Klinikkassistentur

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir einum klinikkassistenti at byrja eftir summarfrítíðina 16. august 2004, ella fyrr.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Tannlæknastovuna í Brekkugøtu 8, 100 Tórshavn, og má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. juni 2004.

Nærri fæst at vita við at ringja.

**Tannlæknastovan í Brekkugøtu**
v/ Marnar Gaard
Ísak Thomassen
Regin Eikhólm
Tannlæknar
Tlf. 315158 · Fax 318716

# Høli til leigu í Runavík

Vælegnað til handil, skrivstovu v.m. Liggur beint við høvuðsvegin, niðan fyri Sjómansheimið.

Umleið 110 $km^2$.

**Ring tlf. 772060 ella 472060**


Sosialurin
www.sosialurin.fo